Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg, løgtingsmaður

Svarari: Sólvit E. Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Starvsfólkatrot á vælferðarøkinum

Spurningar:

1. Hvørji átøk metir landsstýrismaðurin hava størst týdning fyri at bøta um starvsfólkatrotið?
2. Hvat heldur landsstýrismaðurin um, at tað verður sett serlig pulja av til at hækka tær lægstu lønirnar (sum er partur av løgtingsmáli nr. 18/2021)?
3. Hvussu ávirkar starvsfólkatrotið tænasturnar hjá Almannaverkinum í løtuni?

Viðmerkingar:
Starvsfólkatrotið er ein stór avbjóðing, og ein røð av ymiskum átøkum skulu til fyri at bøta um støðuna. Tað var gleðiligt at hoyra landsstýrismannin taka málið fram sum eitt høvuðsmál, nú hann byrjaði í landsstýrissessinum.

Vit í Tjóðveldi hava havt ymisk uppskot frammi fyri at vísa okkara boð uppá loysnir. Vit meta eisini, at henda avbjóðing er so mikið stór, at skal ein varandi og nøktandi loysn finnast, so røkka vit henni best við felags átøkum bæði millum flokkar, kommunur, fakfeløg, stjórnarráð, útbúgvingarskipan, stovnar og aðrar relevantar partar. Vit hava góðar royndir at vísa á, tá ið Løgtingið stóð saman um at gera eina ætlan fyri sjúkrahúsverkið, sum eisini kom í kjalarvørrinum á stórum læknatroti tá. Tí hava vit lagt løgtingsmál nr. 18/2021 fram, har ein røð av átøkum eru við.
Eitt átak er ein serlig lønarpulja til at hækka tær lægstu lønirnar. Hetta er ásannandi av, at lønin hevur týdning, og at lønarlagið hjá nøkrum starvsfólkum er so mikið lág, at tað er so at siga ógjørligt at liva av tí. Tí er áhugavert at vita, hvat landsstýrismaðurin heldur um, at serlig pulja verður sett av til at lyfta lægstu lønirnar.

Økið, sum landsstýrismaðurin varðar av, er eisini nógv merkt av starvsfólkatrotinum. Tí er eisini týdningarmikið at fáa greiðu á, hvørja ávirkan starvsfólkatrotið hevur á tænasturnar til fólk, sum Almannaverkið skal veita.

Leinkja til løgtingsmál nr. 18/2021
Mál (logting.fo)

Á Løgtingi, 14. januar 2022

Sirið Stenberg